Árni Skaale
Jacob Vestergaard
Jørgen Niclasen
Bárður á Lakjuni
Beinir Johannesen
løgtingsfólk

Broytingaruppskot IV

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Yvirskriftin yvir § 13 verður strikað

2. §§ 13 og 14 verða strikaðar.
   §§ 15 – 19 verða eftir hetta §§ 13 – 17.

3. Í § 15, stk. 1, sum verður § 13, stk. 1, verða "og § 13, stk. 2-4" strikað.

4. § 16, stk. 2, sum verður § 14, stk. 2, verður orðað soleiðis:
   "§ 16 fær gildi 1. oktober 2025."

5. Í § 18, stk. 2, sum verður § 16, stk. 2, verður 2. pkt. strikað.

Viðmerkingar
Tað eru komin ríkiligt av gjøldum frá sitandi samgongu, og tí verður hildið, at fleiri eiga ikki at koma. Eitt gjald á hotelkømur og airbnb kann verða ein forðing fyri vaksandi ferðavinnu, og tí kann tað skaða menningina. Ferðavinnan við cruise-skipum er vaksandi, og eitt nýtt gjald á hesa vinnu kann verða ein forðing fyri vøkstri ella í ringasta føri minka munandi um hesa vinnu.

Serligar viðmerkingar:

Ad. 1 og 2
Ásetingarnar um burðardygdargjald og grunn at umsita burðardygdargjaldið verða strikaðar.

Ad. 3-5
Konsekvensbroyting av at §§ 13 og 14 verða strikaðar.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Jørgen Niclasen Jacob Vestergaard Bárður á Lakjuni

Árni Skaale Beinir Johannesen